# gs-tilstandir í Havn

borgarstjóran í Tórshavnar kommunu um sonevnda innkomuvegin til Havnar.

- Eg ætlaði at leggja meg út í blaðkjakið, men hetta varð av ongum. Nú eg havi møguleikan, havi eg kortini hug at nevna tað, sum eftir mínum tykki grundleggjandi skilir partarnar. Og tað, sum skilir, er, at atlitini eru so ymisk.

Hon vísti á, at fyri Landsverk ræður um at knýta suður Føroyar og norður Føroyar saman við eini høvuðsferðsluæðr. Endamálið er at koma so skjótt úr einum landsenda í hin sum gjørligt.

- Men fyri kommununa eru so nógv onnur atlit at taka. Vit vilja ikki hava ein landsveg gjøgnum bygt øki, vit vilja ikki oyðsla við góðum náttúrulendi, vit vilja ferðslutrygd, bæði fyri bilar og fólk, vit vilja hava gongu-og súklubreytir, vit vilja hava ljós á vegirnar, vit vilja íbindingar, og vit vilja gera tað besta fyri borgararnar. Samstundis ynskja vit, at øll skulu kunna koma skjótt og trygt til Havnar.

Marin Katrina Frýdal helt ikki, at Tórshavnar kommuna er órímilig við sínum krøvum.

- Vit hyggja frameftir, og vit vilja ikki hava Miðvágs-tilstandir, har høvuðsferðsluæðrin gongur gjøgnum bygt øki. Vit vilja samstarv, og vit vilja finna bestu loysnirnar saman við Landsverki.

Hon segði, at vegastubbin, sum Landsverk hevur bygt vestanfyri, har hátíðarhaldið var, talar fyri seg og lýkur einki av teimum ynskjum, sum Tórshavnar kommuna vil hava.


1150 METRAR

*Vegurin er umleið 1150 metrar langur og hevur eina samlaða vegabreidd upp á 13 metrar. Hvør gongubreyt er hálvan annan metur, og súklubreytin er eisini hálvan annar metur breið. Sjálvur koyrivegurin er 3,5 tríggjar metrar breiður*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Ringvegurin Klingran

Í síni røðu vendi Marin Katrina Frýdal nú aftur til Klingruna.

- Navnið á vegnum varð endaliga samtykt á býráðsfundi mikukvøldið. Klingran er ein ringvegur, har aðrir vegir verða íbundnir. Fyrsta strekkið inn frá Vegnum Langa eitur frammanundan Klingran, og soleiðis verður Klingran í dag longd við hesum vegastrekki.

Forkvinnan í teknisku nevnd vísti á, at endamálið við vegnum er at knýta ovaru partarnar í Hoyvíkshaganum saman, so koyrandi kann vera millum útstykkingina Inni í Gøtu, útstykkingarnar við Løgmannabreyt og við Flatarvegin.

- Hetta fer at lætta um á verandi veganeti í norðara parti av býnum, segði hon.

Arbeiðið, sum nú er alment tikið í nýtslu, byrjaði fyrst í 2007, og samlaða játtanin var umleið 30 miljónir krónur.

Tað er partafelagið J&K. Petersens Contractors, sum hava staðið fyri arbeiðnum, og ráðgevi hjá Tórshavnar kommunu hevur verið partafelagið HMP Consult.

Vegurin er umleið 1150 metrar langur og hevur eina samlaða vegabreidd upp á 13 metrar. Hvør gongubreyt er hálvan annan metur, og súklubreytin er eisini hálvan annar metur breið. Sjálvur koyrivegurin er 3,5 metrar breiður.

At enda nýtti Marin Katrina Frýdal høvi at takka øllum, sum hava verið knýtt at hesi vegagerð, eins og hon takkaði býlingshúsinum og eigarafelagnum Inni á Gøtu fyri sítt íkast.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Børn plantaðu 150 trø

**VØKSTUR - Nøkur av trøunum kunnu gerast rættiliga stór, um teimum verður lív lagað. Tey, sum gerast størst, kunnu fáa eitt tvørmát upp á einar tveir metrar, segði maðurin, sum skipaði fyri plantingini í gjár, Jógvan Olsen**

Vilmund Jacobsen

Meðan vit bíðaðu eftir, at Marin Katrina Frýdal fór at halda sína røðu og klippa snórin til almennu upplatingina av Klingruni gjáramorgunin, steðgaðu vit á, har børn úr býlingshúsinum Inni á Gøtu plantaðu trø.

Poula Eidesgaard er leiðari á stovninum, sum hevur 11 ár á baki. Sjálv hevur hon starvast har í átta ár.

Hon segði, at 58 vøggustovu-og barnagarðsbørn eru á stovninum, og tey flestu vóru við til hátíðarhaldið í gjár.

- Afturfyri at planta trøini, fáa børnini fruktir og sunkist frá kommununi, segði hon.

Poula Eidesgaard helt, at hetta er stuttligt hjá børnunum, nú stovnurin liggur so tætt uppat, har trøini eru plantað.

- Hetta merkir, at tey gjøgnum árini kunnu fylgja við, hvussu trøini fara at veksa, segði hon.

## 150 trø

Vit høvdu eisini stutt prát við Jógvan Olsen, sum starvast á lendisdeildini hjá Tórshavnar kommunu.

Hann segði, at talan er um umleið 150 trø, sum í gjár og í hesum umfari vórðu sett niður við Klingruna.

- Trøini eru komin av Gróðurstøðini í Hoydølum, og talan er um fleiri sløg av trøum, harav nøkur eru vetrargrøn.

Jógvan Olsen segði, at nøkur av trøunum kunnu gerast rættiliga stór, um teimum verðu lív lagað.

- Okkurt kann fáa eitt tvørmát upp á einar tveir metrar, segði maðurin, sum skipaði fyri plantingini í gjár.

*vilmund@sosialurin.fo*


*Mynd: Jens Kristian Vang*

150 TRØ

*Í gjár plantaðu børn úr býlingshúsinum Inni á Gøtu eini 150 trø við nýggja Klingruvegin, sum nú er alment tikin í nýtslu*